


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Kvalitet fram um kvantitet í Fólkaskúlanum



AKSEL V. JOHANNESEN
valevni hjá Javnaðarflokkinum

Altjóða kanningar vísa, at tey lond, ið hava ta hægst útbúnu arbeiðsmegina, teljast millum heimsins ríkastu lond. Skulu Føroyar gerast ein av heimsins ríkastu tjóðum, er neyðugt at raðfesta útbúgving.

Onki hús er sterkari enn grundin. Tí vil Javnaðarflokkurin raðfesta fólkaskúlan, og lagt verður upp til, at játtanin til fólkaskúlan verður hækkað í komandi valskeiði. Javnaðarfloksins tilmæli er ein fleirstreingjaður eyka innsatsur, sum skal lyfta føroyska fólkaskúlan upp á eitt hægri støði. Javnaðarflokkurin hevur m.a. hesar ætlanir:

Læraraútbúgvingina skal umskipast soleiðis, at talan gerst um eina kanditatútbúgving á universitetsstøði. Verandi lærarar skulu regluliga á skeið/ endurútbúgving fyri at dagføra yrkisførið, og tað skal vera ein beinleiðis skylda hjá skúlaleiðslunum at senda lærarar á skeið, um tørvur er á hesum. Soleiðis fáa vit betri lærarar, lærarin fær betri møguleikar, og harvið kunnu vit eisini seta størri krøv til fólkaskúlan.

Neyðugt er at økja um føroyska tilfarið í skúlanum, soleiðis at næmingarnir altíð hava dagført føroyskt tilfar.

Lærarar tykjast vera samdir um, at stóri trupulleikin er, at lærarin hevur ov lítla tíð til hvønn einstakan næming. Ein loysn kundi verið at býtt skúlaflokkarnar í smærri eindir, men royndir og gransking vísa, at størri flokkar í veruleikanum virka betur enn smærri flokkar. Tí vil Javnaðarflokkurin loysa henda trupulleikan við at seta á stovn eina tvílæraraskipan fyri 1. flokk. Í 1. flokki læra næmingarnir m.a. grundleggjandi amboðið, at lesa, sum er ein fyritreyt fyri nærum øllum øðrum lærdómi, og tí er tað av serliga stórum týdningi í byrjunarundirvísingini, at lærararnir hava stundir til allar næmingar. Málsetningurin skal vera, at allir næmingar duga at lesa léttar tekstir, tá teir eru lidnir við 1. flokk.

Um undirvísingin ikki er nøktandi, nyttar hvørki at senda børnini í skúla eitt ár fyrr ella at økja um tímatalið. Nú mugu vit fyrst raðfesta kvalitetin og síðani kvantitetin!

Vit skulu hava ein góðan fólkaskúla. Børnini eru okkara framtíð. Fáa tey góðan førleika í skúlanum, er tað við til at tryggja framtíðina. Foreldrini skulu kenna seg trygg við, at teirra børn ganga í einum fólkaskúla, har tey læra tað, tey skulu.

Spurningurin er tí ikki, um vit hava ráð, spurningurin er heldur, um vit hava ráð at lata vera.

**Gott val!**

# Skúlin, sum er arbeiðsplássið hjá næmingunum, skal styrkjast



BJØRN KALSØ
landsstýrismaður
Sambandsflokkurin

**Fólkaskúlin skal mennast við at styrkja førleikarnar, betra arbeiðsumstøðurnar og stilla krøv til lærarar og leiðslur. Samstarv millum barnaansing, foreldur og skúla skal skipast frá byrjan. Skúlin, sum er arbeiðsplássið hjá næmingunum, skal hava øll amboð tøk, har tíðarhóskandi tilfar á móðurmálinum er grundarsteinurin**

**Størri virðing**

Taki fult undir við formanninum í Føroya Lærarafelag, sum mælir til at lyfta læraraútbúgvingina á eitt hægri støði, samstundis sum møguleikarnir hjá lærarum at nema sær viðkomandi eftirútbúgvingar skulu betrast.

Krøvini til skúlaleiðslur og lærarar eiga at verða herd, samstundis sum arbeiðsumstøðurnar hjá teimum mugu betrast. Fyri at hetta skal lata seg gera er neyðugt við greiðum ábyrgdarbýti millum land og kommunur. Landsmyndugleikin skal hava eftirlit við, at allir næmingar fáa mennandi møguleikar.

Størri virðing skal skapast um føroyska fólkaskúlan.

**Samstarv**

Innskúlingin skal mennast við at betra um samstarvið millum barnaansingarstovnar og skúla. Foreldur skulu miðvíst takast við í eitt mennandi og varandi samstarv frá byrjan.

Góð skúlabyrjan, minkar um vandan hjá næmingum at detta niður ímillum.

**Innihaldið avgerandi**

Tað er ikki rætt at økja um tímatalið og koyra børnini fyrr í skúla, uttan at væl umhugsaðar og neyvt gjøgnumarbeiddar ætlanir um endamál og innihald fylgja við.

Føroyska málið eigur at vera keldan til innihaldið og skal tí raðfestast høgt. Vit eiga at miða ímóti, at alt undirvísingartilfar skal vera føroyskt og kennast viðkomandi.

Fólkaskúlin, sum eisini er arbeiðsplássið hjá næmingunum, má gerast til eitt trygt lærandi umhvørvi, har øll amboð eru tøk.

Eg fari at virka fyri at menna útbúgvingarmøguleikarnar hjá føroyingum.

# Javnaðarflokkurin, sambandið og fólkaflokkurin hava skapt nýtt stættarbýti



KÁRI PETERSEN
Sjálvstýrisflokkurin

Landsstýrið við Jóannes Eidesgaard á odda hevur givið milliardir burt skattafrítt til einstakar persónar. Fiskiloyviseigararnir (seinni seljararnir) eru so ríkir, at teir kunnu keypa alt føroyska vinnulívið. Nú formanar Jóannes Eidesgaard í nýggjársrøðuni um, at vit ikki aftur mugu fáa stættarmun í Føroyum.

**Jóannes hevur sjálvur skapt nýggja stættarbýti**

Tað er nú undarligt. Jóannes Eidesgaard, sum formanar Føroya fólk um ikki at gera nýtt stættarbýti, hevur sjálvur verið hin fremsti undangongumaðurin fyri nýggja stættarbýtinum. Fyrst gevur Jóannes Eidesgaard saman við samgongufloksunum - fólkaflokkinum og sambandsflokkinum - reiðarum veiðirættindi, fyri einki. Reiðararnir kunnu nú selja hesi loyvi – nógv eru longu seld - fyri hundraðtals milliónir. Einstaklingar fáa skattafrítt 100tals milliónir í lumman, meðan fiskimenn og fólk á landi einki fáa fyri fiskiríkidømi við Føroyar.

**Nýggja stættin eitur fískiloyvisbarónar**

Í Íslandi hava tey fingið eina nýggja yvirstætt: Kvotabarónarnar. Hesir eiga nú alt vinnulív av týdningi í Íslandi. Jóannes Eidesgaard hevur saman við sambandsmonnum og fólkafloksmonnum skapt eina nýggja yvirstætt í Føroyum: Fiskiloyvisbarónar. Um landsstýrið ikki verður koyrt frá, so kemur henda stætt at eiga alt vinnulív av týdningi í Føroyum.

**Privata sølan av loyvunum er til skaða fyri fiskivinnuna og fiskimenn**

Jørgen Niclasen loyvir sær at pástanda, at skipanin er góð fyri fiskivinnuna og fiskimenn. Hetta er beinleiðis ósatt. Tey, sum koma inn í fiskivinnuna mugu átaka sær stóra skuld fyri at keypa fiskiloyviniog fiskivinnan gerst meir og meir skuldarbundin og gevur minni og minni avkast. Av tí at fiskivinnan gevur støðugt minni avkast so verður minni og minni í fiskimansins part.

Privata sølan ger tað eisini ómøguligt hjá ungum røskum monnum at inn í fiskivinnunar. Teir noyðast saman við skipinum at keypa fiskiloyvi í 10 ár fram í tíðina. Hetta er so dýrt, at bert teir allarstørstu reiðararnir hava ráð til tað. Ungir raskir og dugnaligir menn hava ongan møguleika at sleppa framat í fiskivinnuni.

Somuleiðis hava vit sæð, at støðugt fleiri føroysk fiskiskip koma undir útlendskt ræði, hóast føroyskir strámenn standa sum formligir eigarar. Ofta er tað er gott at fáa útlendskar íløgur, tí tær geva nýggja vitan til til landið. Men ikki í hesum føri. Landsstýrið, sum stuðlar undir gongdina við sølu av loyvum til útlendingar, kann ikki vænta, at Føroya fólk trýr uppá, at tað er neyðugt at fáa útlendsk reiðarí hendavegin at læra okkum at fiska.

Tað er tí púra burturúr vón og viti at pástanda, at privat søla av loyvum er góð fyri fiskivinnu og fiskimenn.

**Privata sølan er bert til gagns fyri reiðarar, sum fara úr fiskivinnuni**

Privata sølan er tí bert til gagns fyri nakrar fáar einstaklingar í Føroyum. Teir reiðarar, sum fara úr fiskivinnuni, kunnu fáa hundraðtals milliónir fyri at selja fiskiloyvir, sum landsstýrið gevur teimum fyri einki.

Allir hinir føroyingarnir – bæði landkrabbar og fiskimenn – eru fyri stórum vanbýti. Tey fáa einki av hesum søluinntøkum. Tvørtur ímóti fáa tey verri almennar tænastur og hægri skatt, tí landskassin ikki fær hesar søluinntøkur.

**Hetta landsstýrið má koyrast frá**

Framsøgumenninir hjá landsstýrisflokkunum hava róst verandi skipan alt hetta valskeiðið. Landsstýrið hevur heldur eingi stig tikið til at fáa nakrar inntøkur av fiskiloyvunum. Um Føroya fólk ynskir nakra broyting, so er bert ein møguleiki: Koyr hetta landsstýrið frá, og vel sjálvstýrisflokkin hesaferð.

# "Nokk av snorungum"



JÓNLEIF JOHANNESEN
lærari og valevni hjá Javnaðarflokkinum

Soleiðis froysti ein lærari eftir mær á gongini. Rætt hevði hann.

Tíðin er ikki búgvin at taka nultaflokk inn í skúlan tí: Vit mangla lærarar, vit mangla pláss í skúlunum og vit mangla vitan um, nær føroysk børn eru skúlabúgvin til føroyska skúlan.

Javnaðarflokkurin vil leggja dygd, trivna og menning í núverandi skúlaflokkar.